gult6 cyan6 magenta6 svart6



POLITIKKUR & SAMFELAG

# Jenis vendir samgonguni bakið

**Hóast Miðflokkurin higartil hevur stuðlað samgonguni í sjálvstýristilgongdini, mæli hann nú løgtinginum frá at samtykkja sjálvstýrisleistin**

SJÁLVSTÝRIS-UPPSKOTIÐ
*John Johannessen*

Miðflokkurin er nú ímóti sjálvstýrisuppskoti samgongunnar.

Hetta er greitt, eftir at uttanlandsnevndin mikudagin skrivaði álit um uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks.

Jenis av Rana hevur einsamallur skrivað minnilutaálit, har hann ger greitt, at hann ikki tekur undir við málinum, og at hann mælir løgtinginum frá at samtykkja tað.

Formaður Miðfloksins vísir í áliti sínum á, at hóast høvuðstættirnir í uppskoti landsstýrissins eru í samsvari við stevnuskrá Miðfloksins, so eru týðandi veikleikar, sum forða fyri, at hann kann atkvøða fyri tí.

### Landsstýrið virkar ikki

Jenis av Rana ivast nevniliga í, um í dag yvirhøvur hava eitt virkisfúst landsstýri, sum kann fara undir ætlanina.

»Høvuðstíðindini í Útvarpinum tveir av páskadøgunum vóru, at ein av landsstýrisflokkunum heitti á hinar um, at vórðu ávísar treytir ikki fylgdar, so átti løgmaður at skriva út nýval. Sama áheitan varð aftur borin okkum bæði í gjár og í dag, og ger hetta, at minnilutin ivast í, um fortreytirnar frá valinum ikki eru so broyttar, at landsstýrisflokkarnir ikki eru førir fyri at røkja ta uppgávu, veljarin leit teimum í hendi. Tí metir minnilutin, at rættast var at litið veljaranum í hendi at seta saman eitt nýtt løgting og harvið eitt nýtt landsstýri«, skrivar Jenis av Rana.

Eisini vísir Jenis av Rana á, at landsstýrið hevur brotið lyftið um fólkaatkvøðu um sjálvstýrisleistin, og at landsstýrið ikki hevur megnað greinað út, um blokkurin er ein gáva, ella hann er eitt endugjald fyri millum annað NATO støðir.



*Jenis av Rana, sum higartil hevur stuðlað samgonguni í sjálvstýristilgongdini, hevur nú vent henni bakið*




# Jóannes spyr um dýrkaða fyrisiting

**Jóannes Eidesgaard vil hava at vita frá løgmanni, hvussu nógv miðfyrisitingin er dýrkað, og um ætlanir eru at endurskoða fyrisitingina**

FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Hvussu nógv starvsfólk eru sett í miðfyrisitingini hetta valskeiðið, hvussu nógv størv eru ikki sett í løtuni, hvussu nógv er fyrisitingin dýrkað og hvørji stig eru tikin til at endurskoða hana?

Hesir spurningar hevur Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum sett løgmanni í skrivligum fyrispurningi um almenna fyrisitingarbygnaðin.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at tað stendur í samgonguskjalinum, at miðfyrisitingin skal endurskoðast. Millum annað stendur soleiðis í samgonguskjalinum:

»Til tess at tryggja eina vælvirkandi almenna fyrisiting og almennar stovnar, má bygnaðurin endurskoðast, so hann gerst lutfalsliga bíligari og kemur betur í javnvág við vinnuliga sektorin.

Fyrisitingarliga lógarverkið verður endurskoðað, so umsitingin av øllum málsøkjum verður einfaldari og lagað til tørvin í føroyska samfelagnum.

Í samsvari við arbeiðið við nýggjum kommunubygnaði, verða partar av almenna sektorinum lagdir nærri borgarunum.«

Eisini vísir Jóannes Eidesgaard á kjakið, sum av og á hevur verið um bygnaðarbroytingarnar hjá Finn Normann Christensen. Fólk hava í hesum kjaki reist spurningin, um hesar bygnaðarbroytingar vóru tær best hóskandi.

– Men kjakið hevur eisini snúð seg um, at hesin bygnaðurin gjørdist rættiliga kostnaðarmikil við munandi størri kravi til starvsfólkatal í mun til gomlu skipanina, tó uttan at ávísast kundi, at fyrisitingin gjørdist samsvarandi meira effektiv, sigur Jóannes Eidesgaard.



POLITIKKUR & SAMFELAG



*Vent er nú í holuni í sjálvstýrismálinum. Jóannes Eidesgaard er nú einasti andstøðulimurin í uttanlandsnevndini, ið ikki mælir løgtinginum frá, at samtykkja eina miðvísa sjálvstýrisætlan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Spjødd uttanlandsnevnd:

# Jóannes er næstur samgonguni

**Uttanlandsnevndin hevur býtt seg í fýra partar í støðutakanini til uppskotið til sjálvstýri Føroya fólks. Samgonguflokkarnir taka undir við uppskotinum, Javnaðarflokkurin mælir til broytingar og Sambandsflokkurin og Miðflokkurin mæla hvør í sínum lagi frá at samtykkja uppskotið**

SJÁLVSTÝRIS-UPPSKOTIÐ
*John Johannessen*

Undantikið samgonguflokkarnar, er tað bert Javnaðarflokkurin, ið eftir viðgerðina í uttanlandsnevndini, ikki mælir løgtinginum frá at samtykkja uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks.

Javnaðarflokkurin tekur enntá undir við innganginum í uppskotinum, sum staðfestir, at Føroyar eru tjóð við ómissandi sjálvsavgerðarrætti.

Men Jóannes Eidesgaard vil hava uppskotið broytt, áðrenn hann tekur undir við tí.

Millum annað vil Jóannes Eidesgaard hava, at uppskotið verður avmarkað, so talan er um eina ætlan, ið er galdandi valskeiðið út, og ikki í 12 ár, eins og samgongan skjýtur upp. Hann vil, at ætlanin skal kallast ein sjálvstýrisætlan í staðin fyri fullveldisætlan. Og heildarveitingina úr Danmark vil Jóannes Eidesgaard lække við 107,5 milliónum krónum frá 1. januar 2002. Hetta er tann upphæddin, ríksstuðulin er hækkaður hetta valskeiðið. Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum skal heildarveitingin lækka við 300 til 400 milliónum krónum frá 1. januar 2002.

Jóannes Eidesgaard vil harafturat, at orðingin í uppskotinum hjá landsstýrinum, sum sigur, at búskapargrunnur skal setast á stovn, verður strikað. Formaður Javnaðarfloksins heldur nevniliga, at ætlanin um ein búskapargrunn eigur at verða løgd fram sum sjálvstøðugt lógarmál.

### Færri yvirtøkur

Í uppskoti sínum skjýtur landsstýrið upp, at fólkakirkja, revsirættarmál, persónsrættarmál, húsfólkarættarmál, arvarættarmál, fíggjarrættarmál, havumhvørvisvernd, skúlamál, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar og Vága floghavn skulu yvirtakast í seinasta lagi 1. januar 2002.

Hetta heldur Jóannes Eidesgaard ikki verða ráðiligt, og mælir han tí í staðin til, at havumhvørvisvernd og Íleggingargrunnurin fyri Føroyar verða tey einastu málsøkini saman við Skipaeftirlitinum, ið verða yvirtikin innan 1. januar komandi ár.

Jóannes Eidesgaard vísir tó á, at tað ikki er heilt einfalt at yvirtaka havumhvørvisverndina. Orsøkin er, at málsøkið ikki finst í Heimastýrislógini og eitt notat frá forsætismálaráðnum frá fyrst í áttatiárunum sigur, at málsøkið ikki kann yvirtakast orsakað av altjóða samstarvinum. Men formaður Javnaðarfloksins heldur kortini, at landsstýrið eigur at royna at fáa hetta málsøki yvirtikið, tí ein fiskivinnutjóð sum Føroyar skal sjálvsagt hava ábyrgd av egnum havumhvørvi.

Íleggingargrunnin sær Jóannes Eidesgaard ongar trupulleikar í at yvirtaka.

Yvirtøkurnar av hinum átta málsøkjunum heldur Jóannes Eidesgaard eiga at verða betri fyrireikaðar, áðrenn tær verða framdar. Millum annað vísir hann á, at verður Vága Floghavn yvirtikin í ár í tí líki, hon nú er, kann avleiðingin gerast, at vøllurin ikki verður góðkendur til altjóða flúgving.

Men tað eru eisini málsøki, sum Jóannes Eidesgaard vil hava yvirtikin fyrr, enn landsstýrið hevði ætlað.

Í áliti sínum sigur Jóannes Eidesgaard, at hann kundi hugsað sær, at landsstýrið skundaði undir yvirtøkuna av útlendingalóggávuni og av fjølmiðlaábyrgdarlógini. Hann vísir á, at hesi bæði eru mál, sum bæði hava skund, og sum áttu at verið yvirtikin.

### Uppskotið er valskrá

Jóannes Eidesgaard sigur kortini einki um, nær hesi málsøki skulu verða yvirtikin. Hetta er møguliga orsakað av, at Jóannes Eidesgaard ikki vil viðgera tann partin í uppskotinum, sum fellur uttan fyri hetta valskeiðið.

Formaður Javnaðarfloksins sigur seg bert vilja nýta orku til at viðgera tann partin av uppskotinum, sum fellur innan fyri verandi valskeið. Restina metir hann ikki sum annað, enn eina valskrá.

»Tá landsstýrið ikki megnaði at realisera sítt egna samgonguskjal, leggur man í staðin fram eina valskrá fyri komandi valskeið, har man biðjur komandi samgongur fremja tað í verki, man ikki sjálvur megnaði«, skrivar Jóannes Eidesgaard.

## Kvinnuhúsið skal vera ókeypis

**Annita á Fríðriksmørk heldur, at tað eigur at vera ókeypis at gista í Kvinnuhúsinum. Tí spyr hon landsstýrismannin í almannamálum, um hann hevur ætlanir um at gera hetta møguligt**

FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Hvønn politikk hevur landsstýrið viðvíkjandi harðskapi móti kvinnum, og er ætlanin at gera tað møguligt, at kvinnur og børn kunnu fáa ókeypis mat og innivist í Kvinnuhúsinum?

Hetta spyr Annita á Fríðriksmørk úr Tjóðveldisflokkinum Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, í skrivligum fyrispurningi.

Annita á Fríðriksmørk sigur, at hon setur landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum fyrispurningin, tí hetta fyrst og fremst er eitt sosialt mál. Men hon væntar sær upplýsingar frá landsstýrismanninum í lógarmálum um tey viðurskifti, ið viðvíkja tí revsirættarliga.

– Ynski hjá einum og hvørjum barni, hjá einari og hvørjari mammnu og hjá einum og hvørjum pápa má vera at virka í einari vælvirkandi og dynamiskari familju. Men hetta eydnast tíverri ikki øllum. Meðan flestu børn og foreldur gleða seg til tær løtur, tey kunnu vera saman, so eru nøkur, sum stúra fyri hesum sama, sigur Annita á Fríðriksmørk og sipar til harðskap í heimunum.

Tingkvinnan vísir á, at avleiðingarnar av harðskapinum kunnu verða, at sjálvsálitið hjá kvinnunum hvørvur, og tær verða ótryggar. Og hon vísir somuleiðis á, at børnini líða sálarliga av harðskapinum. Tey ræðast at síggja ella hoyra mammu sína vera offur fyri harðskapi frá pápanum. Hetta ávirkar sosiala lívið, og evnini at læra og mennast verða merkt av teirri viðferð, mamman fær.

– Hesar kvinnur og hesi børn eiga at fáa eina hjálpandi hond, so tey koma burturúr teirri óndu ringrás, tey eru vavd inní, so tey gerast før fyri at koma víðari í samfelagnum, sigur Annita á Fríðriksmørk í viðmerkingum sínum til fyrispurningin.

Annita á Fríðriksmørk vísir á, at Kvinnuhúsið ger eitt megnar arbeiði fyri hesum kvinnum og børnum. Tí heldur hon, at landsstýrið eigur at bera so í bandi, at tey, sum leita sær hjálp í Kvinnuhúsinum, fáa uppihaldið og matin ókeypis.

## Hergeir spyr um avgjald á brennievni

**Eyðun Elltør skal svara Hergeir Nielsen, nær hann fer at koma við uppskoti um at javna avgjaldið á brennievni við atliti til árinini á umhvørvið**

FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Í samgonguskjalinum er avtalað, at brennievni, sum hava minst skaðilig árin á umhvørvið, fáa framíhjárætt við lægri avgjaldi.

Tí spyr Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum í skrivligum fyrispurningi Eyðun Elltør, landsstýrismann í umhvørvismálum, nær hann fer at koma við uppskoti um at javna avgjaldið á brennievni við atliti til skaðiligu árinini, hesi hava.

Hergeir Nielsen vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur gjørt nakrar kanningar í hesum sambandi, og um roknast kann við einum avgjaldspolitikki á hesum øki, sum samsvarar við samgonguskjalið.

Henrik Old úr Javnaðarflokkinum hevur eitt uppskot um at lækka avgjaldið á bensini liggjandi í fíggjarnevndini. Hetta uppskot varð beint aftur í nevnd eftir triðju viðgerð, tí tað var við at forkoma samgonguni. Fólkaflokkurin tók undir við tí, meðan Tjóðveldisflokkurin var ímóti. Tjóðveldisflokkurin metti ikki uppskoti hava nakað við umhvørvispolitikk at gera. Í staðin metti hann uppskotið sum útgjaring. Fyri at bjarga samgongustevinum, gekk Fólkaflokkurin við til at beina málið aftur í fíggjarnevndina, har tað í løtuni verður viðgjørt av nýggjum.